# Nýggjur og nýmótans Miklagarður

**Í morgin letur Miklagarður í SMS upp aftur, eftir at handilin hevur verið stongdur í nakrar vikur, tí umvælingar og útbyggingar eru gjørdar. Tá handilin letur upp, fara kundarnir at síggja ein at kalla spildurnýggjan Miklagarð**

HANDILSUMVÆLING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nógv havnarfólk hava í spenningi bíðað eftir, at Miklagarður skal lata upp aftur eftir umvælingina, og tað hava tey eisini alla orsøk til. Nú handilin í morgin letur upp aftur, er hann vorðin nógv størri, hevur størri úrval, og eisini verða onkrar nýggjar serdeildir inni í sjálvum handlinum.

### Líkist størri donskum handlum

Tá ið tú kemur inn í nýggja Miklagarð, leggur tú beinan vegin til merkis, at handilin er farin at líkjast teimum stóru donsku handlunum, so sum Føtex, Kvickly og Super Brugsen.
Kring allan handilin eru frámerkir, ið býta handilin upp í smærri eindir við eitt nú frukt/grønmeti, kølivørur, blómur, slaktari og annað, soleiðis sum vit eisini kenna tað aðrastaðnis frá.

Tá ið tú ert komin ígjøgnum kassarnar og hevur rindað fyri vøruna, kemur tú aftur til nakrar nýggjar søludeildir. Í SMS hava tey nevnliga gjørt av, at bæði gamla kioskin Hornið og blómubúðin Fípan verða latin aftur, og ístaðin verða hesir báðir handlar ein partur av nýggja Miklagarði.

Í nýggja Miklagarði verður ein serstøk blómudeild, beint tá ið tú kemur inn í handilin, meðan ein kiosk verður í endanum av handlinum, tá ið tú ert farin gjøgnum stóru kassarnar.

Umframt nýggju kioskina er eisini ein serdeild fyri skundverðar, ein bakaradeild og ein deild fyri tips og lotto saman við nýggju kioskini.

### Gamalt ynski

Niels Mortensen, stjóri í SMS, sigur, at tað leingi hevur verið eitt ynski um at fríðka um og útbyggja Miklagarð, og nú er hetta so loksins gjørt.

– Man sigur vanliga, at ein handil skal fríðkast og umvælast við einum millumbili upp á eini 10-15 ár, og vit hava einki gjørt í Miklagarði síðani í 1996, tá ið ein lutfalsliga lítil umbygging var gjørd, sigur Niels Mortensen.

Hann heldur tí, at nýggja útgávan av Miklagarði er harðliga tiltrongd, og hann er sera væl nøgdur við úrslitið, nú latið verður upp aftur í morgin. Spurdur, hvat tað hevur kostað at gera stóru útbyggingina, sigur Niels Mortensen:

– Tað haldi eg ikki, at eg fari at upplýsa. Eg haldi tó, at eg kann siga, at vit hava brúkt nógvar pengar, men hinvegin hava vit fingið nógv fyri pengarnar, sigur hann.

Niels Mortensen greiðir frá, at tað er ein arkitektur í Danmark, sum hevur serkunnleika innan fyri handlar, sum saman við leiðsluni í SMS hevur funnið fram til, hvussu nýggi Miklagarður skal síggja út.

– Tað er eingin loyna, at vit eru fakidiotar. Tí hyggja vit altíð eftir, hvussu slíkir handlar síggja út uttanlands, tá ið man er uttanlands, og hagani hava vit fingið nógvan íblástur, sigur stjórin í SMS.

Niels Mortensen vil heldur einki siga um, hvørjar handlar nú fara at verða í hølunum, har Hornið og Fípan vóru áður.




*Frukt og grønt deildin í nýggja Miklagarði er eisini munandi størri, enn hon var í gomlu útgávuni.* Mynd: Álvur Haraldsen






*Blómuhandilin Fípan er nú stongdur, og ístaðin letur ein serstøk blómudeild upp inni í sjálvum Miklagarði.* Mynd: Álvur Haraldsen

# Størsta bókaútsølan nakrantíð

**Í morgin verður bókaútsøla í bókahandlunum kring landið. Talan er um afturvendandi útsøluna, sum er triðja hvørt ár, og hesaferð er talan um tí størstu av sínum slag nakrantíð**

BÓKAÚTSØLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bókaútsølan hesaferð er tann sjeynda í røðini, og ongantíð áður hava so nógvar bøkur verið á útsølu. Tilsamans er talan um ikki færri enn 440 ymsar bøkur, ið eru býttar upp í 28 ymsar bólkar. Allar bøkurnar á stóru bókaútsøluni eru á føroyskum. Antin eru tær uppruna føroyskar, ella eru tær týddar til føroyskt.

### Óvanliga nógvar skaldsøgur

Á tíðindafundi á Føroyaprent í morgun greiddi Kári Árting frá Bókasøluni, ið stendur fyri at samskipa stóru bókaútsøluna, frá úrvalinum á útsøluni. Hann segði millum annað, at tað er merkisvert, at tað hesaferð eru ikki færri enn 42 skaldsøgur við á útsøluni.

– Tað er mong ár, har eingin skaldsøga kemur út á føroyskum, og tí er tað merkisvert, at so nógvar eru við á útsøluni hesaferð. Fyri at kunna verða við á bókaútsøluni skal ein bók verða í minsta lagi trý ár, og hon sleppur bert við tvær ferðir, segði Kári Árting.

### Nógvir klassikarar

Millum tær mongu bøkurnar á bókaútsøluni eru eisini nógvir klassikarar, so sum Fiskimenn hjá Martin Joensen, Men lívið lær hjá Heðin Brú og Íslandsklokkan hjá Halldór Laxness.

Í kvøld verður bókablaðið við útsølubókunum borið út kring alt landið, og lítið er at ivast í, at nógvir føroyingar fara at nærlesa blaðið at kanna eftir, hvørjar bøkur tey skulu ogna sær, tá ið bókaútsølan byrjar í morgin.

At tilboðini eru góð, er einki at ivast í, og avsláttúrin upp á bøkurnar er upp í heili 85 prosent.



*Umboðini fyri bókahandlarnar kring landið sótu so hugagóðir og hugdu í bókablaðið á tíðindafundinum á Føroyaprent í morgun*
Mynd: Terji Nielsen